TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Skattakærudeildin

Skattakærudeildin skal, sambært lóg, taka sær av fyrisitingarligu uppgávuni hjá Kommunalu skattakærunevndini fyri Tórshavnar økið sum er fyrsti kærumyndugleiki yvir avgerðum hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Skattakærudeildin er skipað undir Tórshavnar kommunu, og hevur ábyrgdina av at kærur um álíkning av skatti, frá borgarum og vinnurekandi í økinum, verða skrásettar og viðgjørdar sambært galdandi reglum. Umframt kærur um vanliga álíkning av skatti, er arbeiðsuppgávan kærur um ferðastuðul, rentustuðul og stuðul til dupult húsarhald.

Deildin skal lýsa kærumálini, so hesi kunnu leggjast fyri Kommunalu skattakærunevndina til støðutakan.

Á deildini eru 3 fulltíðarstørv.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

# Fulltrúi til skattakærudeildina

Søkt verður eftir fulltrúa til skattakærudeildina hjá Tórshavnar kommunu at byrja skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**

- Lýsa og viðgera kærur um álíkningina hjá Toll- og Skattstovu Føroya.
- Geva skattakærunevndini tilmæli um avgerð í skattakærumálum.
- Samskifta við kærarar, umboðsfólk og myndugleikar í hesum høpi.
- Luttaka í gerð av avgerðarsavni.
- Ansa eftir at lógir, reglugerðir og avgerðir v.m. verða fylgdar.
- Ráðgeva skattakærunevndini, formanninum og skrivaranum í løgfrøðisligum og roknskaparligum spurningum.
- Ymsar ráðgevarauppgávur í kommunalu umsitingini.

**Førleikakrøv**

Tú skalt hava hægri løgfrøðisliga ella búskaparliga útbúgving frá lærdum háskúla ella líknandi. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur hollan kunnleika og royndir innan arbeiðið við roknskapi og skattarætti. Tað verður kravt av tær, at tú hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði. Eisini er neyðugt at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, hevur lætt við at samskifta og tekur tøk tá á stendur, ert røkin og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og onnur.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn sambært avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Jón Joensen, deildarleiðara, ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

**Umsókn**

við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og avrit av prógvum og viðmælum v.m., skal verða Tórshavnar kommunu, Postsmogu 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. januar 2005.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Dagstovnurin Kurl@

Á stovninum er ein vøggustova við 12 børnum og ein barnagarðsstova við 22 børnum. Á stovninum starvast 8 fólk.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

# Barnaansingin í Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin Kurl@ eftir**

- einum pedagogi at arbeiða 24/32 tímar um vikuna í barnagarðsstovu at byrja sum skjótast.
- einum hjálparfólki at arbeiða 24/32 tímar um vikuna í vøggustovu at byrja sum skjótast.

**Setanarviðurskifti**

Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**

um størvini við at venda sær til Ann Jacobsen, stovnsleiðara, tlf. 353500.

**Umsókn**

saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum Kurl@, Sundsvegur 3, FO-100 Tórshavn í hendi seinast mánadagin 3. januar 2005.



Sosialurin Sosialurin i



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Dagstovnurin við Botnánna

Á stovninum er ein barnagarðsstova við 20 børnum og fýra starvsfólkum, og frítíðarskúli við 25 børnum og 3 starvsfólkum.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

# Barnaansingin í Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin við Botnánna í Kollafirði eftir trimum fólkum til frítíðarskúlan:**

- einum pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja 15. januar 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einum hjálparfólki at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja 1. februar 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einum hjálparfólki at arbeiða 25 tímar um vikuna, fyri hjálparfólk í farloyvið, at byrja 1. februar 2005. Farloyvið er frá 1. februar 2005 til 30. juni 2005.

**Setanarviðurskifti**

Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**

um størvini við at venda sær til Emy Fjallstein, stovnsleiðara, tlf. 421323.

**Umsókn**

saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og roynd skal vera Dagstovninum við Botnánna, Botnavegur, FO-410 Kollafjørður í hendi seinast mánadagin 3. januar 2005.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Dagstovnurin á Hamrinum

Á stovninum eru tvær vøggustovur við 12 børnum í hvørjari og tvær barnagarðsstovur við 18 børnum í hvørjari. 3 og 4 starvsfólk eru í hvørjari stovu.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

# Barnaansingin í Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin á Hamrinum eftir**

- einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. februar 2005 ella eftir nærri avtalu.

Pedagoglesandi, ið verða liðug í februar 2005, eru vælkomin at søkja.

**Setanarviðurskifti**

Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**

um størvini við at venda sær til Elisabeth Henriksen, stovnsleiðara, tlf 322003.

**Umsókn**

saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndum skal vera Dagstovninum á Hamrinum, Glyvursvegur, FO-160 Argir í hendi seinast mánadagin 10. januar 2005.



Sosialurin fax 341801